# Koyrt 950 kilometrar í Føroym í tvær vikur

**Tvey íslendsk pør hava í 14 dagar ferðast í Føroyum í húsbilum. Tey bera føroyingum og Føroyum tað allar besta, men enn vantar tað síðsta, áðrenn føroyingar kunnu reypa av Føroyum sum ferðamannalandi**

FERÐAVINNA
*Dagfinn Olsen*



*Ragnar Sigurðbjørnsson, Anna Stina Þórarinsdóttir, Signý Guðmundsdóttir og Hólmar Tryggvason eru væl nøgd, eftir tvær vikur í húsbili í Føroyum. Tey hava lagt 950 kilometrar aftur um bak og teknað leiðina á kort, so nógv asfalt er ikki eftir óteknað á Føroyakortinum hjá teimum*
*(Mynd: Maria Olsen)*

Á tjaldingarplássinum Yviri við Strond í Havn sótu fyrrapartin mikudagin fýra væl nøgdir íslendingar, tvey pør. Frammanfyri húsbilunum, ið nevnast Bjarmi og Saga Class, sótu Hólmar Trýggvason, Signý Guðmundsdóttir, Ragnar Sigurðbjørnsson og Anna Stina Þórarinsdóttir.

Tey hava í tvær vikur so at siga koyrt Føroyar upp og niður. Heilar 950 kilometar og hava tey teknað alla leiðina á eitt Føroyakort og har er ikki nógv asfalt eftir, ið ikki er uppmerkt.

### Ólavsøkan sermerkt

Tey hava havt góðar dagar í Føroyum og upplivdu ólavsøkuna og hetta var sermerkt. Serstakliga miðnáttarsangurin hugtók, har gomul sum ung sungu saman. Og hóast tey ikki sjálvi fingu sungið við í stóra felagskórinum, so var hetta ein ógloymandi uppliving.

Og at so Ormurin Langi var kvøðin eftir sangin gjørdi bert heildarupplivingina betri, tí hetta er nakað, ið íslendingar hava tikið til sín.

Á ferðini hava tey tikið upp einar 150 minuttir á sjónband og tiknar eru fleiri enn 900 myndir við digitalum myndatóli.

### Fryntlig fólk

- Føroyingar eru sum lítlibeiggjar hjá okkum. Tað er gaman at ferðast her og tað merkist, at hetta er sama fólk, sigur Hólmar.

Føroyingar eru stak vinarligir, meta tey fýra, og tey hava gist á bryggjum og aðrastaðni í bilum sínum. Og lætt er at koma í prát við fólk og ofta eru tað menn, sum hava fiskað undir Íslandi, sum hava hug at práta og tað halda tey vera hugaligt.

Føroyingurin er í teirra eygum fryntligur og eitt fyrikomandi og tolið fólkaslag.

- Tað er gaman at hitta fólk og her er eingin strongd. Tá vit koma í stóru bilunum efir mangan smølu vegunum, so bíða fólk bara. Í Íslandi leggjast bilførarar beinanvegin á floytuna, sigur Ragnar.

### Ikki 100% ferðamannaland

Hóast tey eftir góðar dagar ikki vilja sýnast ótakksom ella ov næsadjørv, so er eitt og annað, sum tey við vælmeintum huga hava siga um ferðamannalandið Føroyar, um tey verða spurd.

- Her er reint og væl umgingið í flestu førum. Men t.d. í Klaksvík var tjaldingarplássið bert opið ávísar tíðir og ikki á kvøldi ella í vikuskiftunum, og tað hjálpti lítið, tá vit sum ferðandi komu á kvøldi standandi til vikuskifti, greiða tey frá.

Á Sandi vanta t.d. viðurskifti, so ein kann turka sær klæðir, snórar. Og í Suðuroynni var bert tjaldingarpláss, so tey máttu við bilum sínum standa á parkeringsøkinum, men har var hall á, men annars vóru góð viðurskifti.

Tjaldingarplássinum í Havn bera tey alt gott, tó at ynskiligt kanska hevði verið við vølli, ikki grúsi, so betri var at ganga í léttari fótbúna ella berføttur. WC-viðurskiftini eru á leið sum tey skulu, men yvirhøvur vantar í Føroyum útbúnaður, so wc'ini í bilunum kunnu tømast. Hetta er heilt vanligt í øðrum londum og er við jøvnum millumbilum at finna. Í Havn átti kanska eisini at verið betri møguleikar, tá tað kemur til vask og turking av klæðum, meta tey fýra.

### Gestsins eygað

Sum heild meta tey, at Føroyar sum ferðamannaland ikki enn er hundrað prosent á máli, men tey gera vart við, at hetta er sagt í vælmeintum orðum, tí tey hava havt góðar og ógloymandi dagar í Føroyum.

- Tað er, sum føroyingar ikki »vilja« (sagt við keipum, sum siga gásareygu, blðm) vera ferðamannaland. Tað vantar at gera íløgur, so ferðavinnan veruliga kann menna seg og geva nakað av sær, meta íslendsku ferðafólkini.

Annað eru avmerkingar, skelti. Har er eisini illa statt í mongum førum og trupult kann vera at finna fram á støð, ið eru verd at vitja.

At føroyingar ikki duga sum tænastuvinnurekandi, hevur ofta verið at hoyrt. Og hetta hava íslendingarnir eisini lagt til merkis, hóast júst hetta ikki eru teirra orð. Serliga trupult er, um vitjandi koma, tá alt annars ikki er gerndisligt í Føroyum.

Eisini eru tey fýra í Havn fleiri ferðir komin í samband við ferðafólk av ferðamannaskipum, sum ikki veruliga hava havt nakrastaðni at fara. Kanska ein handil við gávulutum hevur verið opin, ongastaðni fæst ein biti til matna, og ferðamannastovur hava kanska latið upp seinni á degnum, men slík ferðafólk hava bert fáar tímar í landi.

- Heima hyggur ein ikki á sama hátt, tá ein ferðast. Tað er øðrvísi, tá ein ferðast í øðrum londum, sigur Ragnar og minnir harvið á gløggu eygu gestsins.

Íslendingar eru kendir fyri at ferðast í egnum landi. Í Íslandi ferðast tey fýra nógv og eru einar 50 til 60 nætur í bilinum árliga.

### Góðir sendimenn fyri Føroyar

- Tá vit koma heim aftur fara vit at greiða frá um ferðina og vísa myndir og vit eru góðir sendimenn fyri Føroyar, tí vit hava havt eina summarfrítíð, sum vit seint gloyma.

- Fólk spurdu, hvat vit ætlaðu at gera 14 dagar, ein hálvan mánað, í Føroyum. Men vit hava havt tað gott, og nú vit eru ávegis heim, kundu vit hugsað okkum eina viku afturat, siga tey fýra væl nøgdu ferðafólkini.

- Hugskotið at ferðast til Føroya kom, tí onkur teirra hevur arbeitt saman við føroyingum í Grindavík. Og so var tað eisini ætlanin um at ferðast styttri og kanska øðrvísi leið, ikki leggja leiðina út í Europa, sum so mong gera.

- Í Íslandi eru tey við í einum húsbilafelagsskapi, ið telur 700 húsvognar.

- So tá vit koma næstuferð, so eru vit óivað fleiri, tí slíkt »smittar«, greiða Ragnar og Hólmar læandi frá.

Bilarnar, ið tey koyra í, hava tey sjálvi gjørt til húsbil. Teir eru frá 1975 og 1982 og hava áður verið nýttir til onnur endamál,t.d. rutukoyring. Men nú hava teir nøvnini Bjarmi og Saga Class og eru sera snotuligir.

- Vit hava havt sera goðan túr og tað hevur verið gaman. Og vit takka fyri veðrið, tað hevur verið sól, og bert mjørki í einar tveir dagar. Og fólk hava verið sera fryntlig og blíð, siga tey fýra, sum væl nøgd fóru av landinum aftur við Norrønu í gjár.



*Húsbilarnir eru frá 1975 og 82 og hava áður verið nýttir til onnur endamál, men eru so gjørdir til húsvogn. Og har er alt inni, so ein kann kenna seg sum heima*
*(Mynd: Maria Olsen)*



# Minni til ferðaskrivstovurnar

**Flogfeløgini, sum reka ferðafolkaflúgving millum Føroyar og útheimin, eru farin at nýta nýggjar avrokningarhættir mótvegis teimum, sum selja flogferðaseðlarnar fyri flogfeløgini. Nýgja avtalan gevur minni í part til ferðaskrivstovurnar**

FLOGFERÐSLA
*Edvard Joensen*



*Ferðaskrivstovurnar skulu nú sjálvar áseta avgreiðslugjald fyri flogferðaseðlar. Men skrivstovurnar hava lagt seg á tað gjaldið, sum flogfeløgini sjálv hava roknað seg fram til*

Flogfeløgini, sum reka ferðafólkaflutning millum Føroyar og útheimin, eru farin at brúka nýggjan avrokningarhátt mótvegis teimum ferðaskrivstovum, sum selja ferðaseðlar til flogførini.

Eftir nýggjari skipan, sum kom í gildi tann 1. august, er álagt ferðaskrivstovunum sjálvum at áseta avgreiðslugjaldið, sum tikið verður fyri at avgreiða flogferðaseðlarnar.

Flogfeløgini hava sjálvi ásett sær eina ómaksløn upp á kr, 220,- fyri hvønn ferðaseðil millum Føroyar og Danmark, og tað hevur so av sær sjálvum gjørt, at ferðaskrivstovurnar eisini hava ásett sama tal, sigur Dánjal Poulsen, stjóri á ferðaskrivstovuni Faroe Travel.

Hetta talið er kortini so lágt, at tað ber illa til at liva av tí, vísir hann á. Hann vísir til ein kanning, sum gjørd er av líknandi gjøldum í Europa. Hendan kanning vísir, at tað kostar í meðal kr, 260,- at avgreiða ein ferðaseil, sigur Dánjal Poulsen.

Í hendan kostnað heingir hann alt, sum hevur við útreiðslur hjá skrivstovuni at gera yvirhøvur. So sum húsaleigu, arbeiðsløn, ljós og hita og ikki minst telefonútreiðslur. Eitt nú hava feløgini dýrar on-line skipanir, har teldusamband alla tíðina er um allan heim, soleiðis at til ber at sita í Føroyum og booka ferðaseðlar til flogfør millum Vanuatu og Tonga nær tað skal vera.

Magni Arge, stjóri á Atlantsflog, sigur, at fyrr var mannagongdin tann, at flogfeløgini lótu ferðaskrivstovurnar selja ferðaseðlarnar fyri ein bruttoprís, og síðan var avroknað við átta prosentum til skrivstovuna.

Í dag verður tað gjørt soleiðis, at ein nettoprísur er ásettur, og síðan verður latið ferðaskrivstovuni til sjálv at áseta sítt ómaksgjald. Hetta avgreiðslugjald hevur Atlantsflog so ásett til at vera kr, 220,-.

Flogfelag Føroya er ein av ferðskrivstovunum, sum selir ferðaseðlar fyri bæði Atlantsflog og Maersk Air.

Marita Danielsen á Flogfelagnum, upplýsir, at har verða tiknar kr, 220,- í avgreiðslugjaldi fyri ferðaseðlar, sum seldir verða millum Froyar og Danmark. Selir Flogfelagið so ein ferðaseðil við eitt nú Maersk Air millum Danmark og London, verða tiknar kr, 150,- í avgreiðslugjaldi fyri tann seðilin.

Keld Mosgaard Christensen, rutustjóri hjá Maersk Air, váttar, at ymiskir prísir eru á avgreislugjøldunum millum Føroyar og Danmark og Danmark og restina av Europa. Men hann avvísir púra avgjørdur, at avtala er gjørd millum flogfeløgini á Føroyarutuni um tað.

– Grundarlagið undir prísinum er kostnaðurin á ferðaseðlunum, greiðir Keld Mosgaard frá. Vit hava tikið ein mðalprís fyri allar ferðaseðlar á Føroyarutuni. Tað vil siga vanligum ferðaseðlum, APEX-, vikuskiftis- barnaferðaseðlum og hvat nú er, og út frá tí roknað okkum fram til hetta talið, sigur hann.

At tað er bíligari at avgreiða ein ferðaseðil úti í Europa enn til Føroyar kemst av ferðaseðlaprísinum. Prísurin er lægri aðrastaðni, og tí verður prosentvísa avgjaldið eisini lægri.

Spurdur um tað so ikki eisini bar til at ferðast bíligari millum Froyar og Danmark, svarar Keld Mosgaard Christensen, at tað eru flogfeløgini ikki einsamøll um at gera av. Allir prísir skulu góðkennast av Ferðslumálaráðnum, og hesir, sum nú eru galdandi, eru teir, sum Ferðslumálaráðið nú hevur góðkent.

# Løgin frágreiðing

**Formaðurin í Lndsstýrismálanevndini heldur tað vera løgið, at ein umbiðin løgfrøðifrágreiðing skal viðgera niðurstøðuna hjá nevndini heldur enn avleiðingarnar av tí, landsstýrismaðurin við fiskivinnumálum fer at gera við málið um Jógvan S**

JÓGVAN S
*Edvard Joensen*



*Heini O. Heinesen heldur tað vera álvarsligt, at landsstýrismaðurin brúkar almenna pengar upp á at lata privatar løgfrøðingar kanna, hvat arbeiðið hjá Lnadsstýrismaálanevndini nyttar*

Heini O. Heinesen, formaður í landsstýrismálanevndini undrast á frágreiðingina frá Halgiri Winther Poulsen, advokati, sum kunngjørd varð í útvarpi og sjónvarpi týskvøldið.

– Eg haldi tað bæði vera sera løgið og álvarsligt, at tað almenna rindar fyri ein løgfrøðikanning, sum viðger ta niðurstøðu, Landsstýrismálanevndin er komin til. Mær vitandi skuldi landsstýrismaðurin kanna, hvørjar avleiðingar tað fór at fáa, um hann tekur fyribilsloyvið hjá Jógvani S aftur ella ikki. Hetta tykir mær meira sum umbiðið arbeiði. Serliga tá einki annað kann leka út, heldur Heini O. Heinesen.

Hann sigur, at tað ávirkar kortini ikki hansara støðu í málinum, tí Landsstýrismálanevndin hevur viðgjørt sín part. Nevniliga at svara eini beinleiðis kæru um viðgerðina hjá fiskivinnuumsitingini.

– Og tað er hetta, nevndin er til. At ansa eftir, hvussu landsstýrismenninir røkja sítt arbeiði, vísir Heini O. Heinsen á.

Hann heldur tað vera heilt óviðkomandi og púra óneyðugt at gjalda almennar pengar fyri at vita, hvat ein privatur løgfrøðingur heldur um niðurstøðuna hjá Landsstýrismálanevndini. Tað var als iki tað, málið snúði seg um, vísir Heini O. Heinesen á.

Tað eydnaðist ikki at fáa orð á landsstýrismannin við fiskivinnumálum, Jacob Vestergaard, áðrenn blaðið fór til prentingar. Men á beinleiðis útvarpaðum tingfundi fyrrapartin í gjár segði hann, at niðurstøða hansara í málinum fer at verða kunngjørd heilt skjótt.